# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Glantrileikur ella fólkaræði

Forsetavalið í Ruslandi er av, og úrslitið gjørdist sum væntað. Medvedev varð kosin forseti, men hvat hetta í roynd og veru merkir, eru eygleiðarar ósamdir um. Talan er ivaleyst um eitt sera tætt samband millum nýggja forsetan og fráfarandi forsetan Putin. Nógv vilja vera við, at eingin broyting verður, og at Putin í veruleikanum verður tann, sum framhaldandi fer at stjórna stórveldinum fyri eystan. Men tað eru eisini tey, sum vísa á munin á hesum báðum monnum. Meðan Putin kom frá loyniliga politiinum, tí sera illa gitna KGB, so hevur Medvedev heilt annað bakstøði. Hann er løgfrøðingur eins og Putin, men hevur eina fortíð í fyrisitingini hjá Gorbatjov og sum advokatur í Leningrad. Hann er sera evnagóður, og stóri spurningurin er, hvørt hann fer at lata seg fjarstýra av Putin, sum flestu eygleiðarar nú einaferð halda. Allir eygleiðarar eru tó samdir um, at valið meira var glantrileikur enn ein ein vanlig fólkaræðilig hending.

Men sum sagt, er Medvedev sera gløggur, og hann veit, at sambært stýrisskipanini hevur forsetin at kalla alt valdið í ríkinum. Hann dugir eisini, eins og vinmaðurin Putin, sín Machiavelli, sum m.a. annað segði, at ert tú komin til valdið við hjálp frá góðum vinum, so skalt tú sleppa tær av við vinirnar, so skjótt tú hevur fingið valdið. Hetta var júst tað Putin gjørdi við Jeltsinj og allan hansara klan. So skjótt Jeltsin hevði lagt frá sær mistu hann og øll rundan um hann alla ávirkan. Tey vórðu uttan drál koyrd út í myrkrið.

So er spurningurin: kann nakað tílíkt henda fyri Putin og hansara valdskervi? Flestu eygleiðarar ivast. Medvedev er ikki Putin og Putin er ikki Jeltsin. Alt bendir á, at báðir menn hava gjørt eina avtalu, sum tryggjar, at Putin sum komandi forsætisráðharri fær mikið vald, soleiðis, at hann í roynd og veru kemur at stjórna Ruslandi komandi árini - hetta antin saman við ella uttan Medvedev.

Fyri vesturheimin er tað avgerandi, um nakrar broytingar fara at henda í uttanríkispolitikkinum. Tað er tó einki, ið bendir á, at nøkur broyting í kósini er á veg. Báðir menn fara helst at halda fram við at vinna Ruslandi gamla plássið sum eitt av heimsins mætastu stórveldum aftur. Somuleiðis bendir alt á, at Medvedev fer at halda eina alt meira fasta kós mótvegis USA og Bretlandi, og at henda tilgongd kann enda við einum nýggjum køldum kríggi. Hernaðardubbingin fer at halda fram, og teir báðir valdsharrarnir fara at royna at byrgja fyri vaksandi amerikonsku ávirkanini í Eystureuropa. Somuleiðis fara teir at nærkast Kina og økja ávirkan Ruslands í Asia og í Afrika. Teir hava góð kort á hondini. Tað sterkasta kortið er, at Rusland ræður yvir nøkrum av ríkastu orkukeldum í heiminum, samstundis sum eitt nú USA gerst støðugt meira heft at innfluttari orku. Heimurin er neyvan vorðin tryggari av valinum í Ruslandi í gjár.

**Sosialurin**

# Trúvirðið hjá føroyskum bankum í vanda



**EDMUND JOENSEN**
løgtings- og fólkatingsmaður

**Landsstýrið undirgrevur trúvirðið hjá bankavinnuni við ætlanini um at seta á stovn eitt føroyskt fíggjareftirlit**

Hóast trúvirði er altavgerandi fyri bankarnar, velur landsstýrið at pilka við júst trúvirðið við ætlan síni um at seta á stovn eitt føroyskt fíggjareftirlit.

Higartil hevur landsstýrið ikki grundgivið fyri, hví fíggjareftirlitið skal yvirtakast frá danska statinum. Einasta grundgeving, ið hómast í samgonguskjalinum, er: "til tess at menna samfelagið og víðka um virkisførleikarnar".

Her kundu vit hóskandi spurt: Virkisførleikarnar hjá hvørjum? Í øllum førum ikki hjá føroysku bankunum!

Bankarnir í Føroyum hava sum er fyrimun av at vera partur av danska fíggjargeiranum. Danski búskapurin hevur ikki verið sterkari enn nú, og stórt trúvirði er um danska fíggjarkervið og fíggjareftirlitið. Hetta "smittar yvir á" føroysku bankarnar, t.d. tá teir skulu lána pening uttanlands.

Skulu Føroyar hava egið fíggjareftirlit, verður ein avleiðing helst, at føroysku bankarnir skulu gjalda meira, tá lánast skal uttanlands. Henda rokningin verður uttan iva send lántakarum í Føroyum. Meira álvarsligt er, at álitið á fíggjareftirlitið hjá heimastýrinum verður avmarkað.

Føroyska fíggjarvinnan vinnur nógvan pening uttanlands. Hon er vorðin eitt nýtt bein hjá føroyska búskapinum at standa á, og fleiri hundrað fólk starvast í hesi vinnu. Umráðandi er, at fíggjarvinnan varðveitir kappingarførið og kann halda fram at vinna pening uttanlands. Henda positiva gongd kemur í vanda, um altjóða fíggjarvinnan fær orsøk til at ivast í trúvirðinum hjá føroyskum bankum.

Tað tykist óumhugsað av landsstýrinum at vilja yvirtaka fíggjareftirlitið, og landsstýrið hevur neyvan spurt fíggjarvinnuna eftir, um talan er um eina skilagóða yvirtøkuætlan. Mín pástandur skal ikki vera, at ætlaða yvirtøkan av fíggjareftirlitinum er størsta hóttanin móti føroyska bankakervinum síðani bankakreppuna, men tað er líka við.

# Altjóða umdømi Føroya – ein felags søk



**HØGNI HOYDAL**
uttanríkisráðharri

**Altjóða umdømi Føroya eigur ikki at vera lutur í partapolitiskum spæli, sum hoyrir farnari tíð til. Vónandi rættar Edmund Joensen ella formaður Sambandsfloksins óhepnu útsagnirnar um álitið á fíggjarkervið í Føroyum**

Edmund Joensen, løgtingslimur, fólkatingslimur og fyrrverandi løgmaður fyri Sambandsflokkin, roynir nú at sáa iva um álitið á føroyska fíggjarkervið og á føroyskar myndugleikar í sambandi við, at landsstýrið fer at taka fulla ábyrgd av føroyskum fíggjarrætti.

Hetta ber tíverri boð um eina politiska framferð, ið hoyrir eini farnari tíð til.

Tíðin átti langt síðani at vera farin frá, at føroyskir politikarar støðugt gera Føroyar til ein avbyrgdan og tilafturskomnan útjaðara í Danmark og halda seg fáa politiskan vinning í Føroyum av at ræða føroyingar frá at hava álit á, at vit megna at taka ábyrgd og samstarva við onnur á jøvnum føti í altjóða samfelagnum.

Framferðin hjá Edmundi Joensen byggir helst á ta misfatan, at ongin heimur er uttanfyri føroyska heimastýrið, og tískil gevur hann sær neyvan far um, at hann kann skaða altjóða umdømi Føroya við slíkum útsagnum.

Tá ein fyrrverandi løgmaður og núverandi løgtings- og fólkatingslimur fer út við ógrundgivnum uppáhaldum í onkrum innanhýsis partapolitiskum spæli í Føroyum, verður tað eisini lisið og sæð í útheiminum.

**Sakligar atfinningar bera fram**

Altjóða umdømi Føroya eigur at gerast ein felags søk – hóast tær ósemjurnar, ið vit hava og fara at hava í føroyskum politikki. Tað er alneyðugt, um føroyska samfelagið skal mennast og gerast kappingarført í heiminum.

Tað merkir ikki, at Edmund Joensen ella onnur skulu gevast at finnast at landsstýrinum ella koma við øðrum uppskotum um, hvussu viðurskiftini skulu skipast.

Tað merkir bert, at atfinningarnar mugu vera ítøkiligar og sakligar og vísa á, hvussu vit megna at liva upp til hægstu altjóða krøv og at skapa álit á okkara skipanum. Og tað verður ríkiligt høvi at viðgera hesar spurningar, tá ítøkiligt uppskot kemur frá landsstýrinum at taka støðu til.

Málið hjá landsstýrinum er greitt: Í okkara fyrisiting, lógarverki og eftirliti skulu vit fylgja hægstu altjóða standardum, og vit skulu somuleiðis lata okkum meta og eftirmeta av altjóða stovnum til tess at liva upp til altjóða bindingar og krøv.

Tí er mín vón at Edmund Joensen ella formaður Sambandsfloksins rætta útsagnirnar. Tí eg havi álit á, at ongin hevur áhuga í at velja partapolitisk spæl fram um altjóða umdømi Føroya – ið hevur týdning fyri alla vinnu, mentan og einstaklingar í Føroyum.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Mortensen niels@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.